

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 05 - 2012

# Kinverskar milliardir ávegis til Grønlands

Ein íløga uppá 12 milliardir krónur í eina námsverkætlan í Grøndlandi kann tryggja 3500 fólkum arbeiði. Pengarnir koma úr Kina umvegis bretska námsfelagið London Mining, sum við kinversku samstarvsfeløgum sínum og kinverskum kapitali, er til reiðar at seta 12 milliardir krónur í eitt jarnnám uttanfyri grønlendska høvðusstaðin Nuuk. Tað skrivar danska blaðið Børsen. Grønlendska oljustýrið skal, sambørt Børsen, rokna við at fáa ein umsókn um verkætlanina áðrenn summarfrítíðin byrjar. Um vit ikki fáa loyvið, so veit eg ikki hvør skal hava tað. Vit skulu ikki brúka kemikaliir í okkara arbeiði, og leivdarúrdrátturin er reint vatn, sigur samskiftisstjórin í London Mining, Kaj Kleis, við Børsen. Kaj Kleis sigur seg somuleiðis vera sannførdan um, at einki vesturlendskt felag hevur fíggjarliga orku til at seta somu mongd av pengum í eitt jarnnám í Grønlandi. London Mining vónar, at verkætlanin kann byrja áðrenn árslok. Samstundis verður roknað við, at jarnnámið kann tryggja arbeiðsleysum í Grønlandi eitt starv. Arbeiðsloysi í Grønlandi er umleið sjey prosent, ið svarar til umleið 2800 fólk. Sambært Børsen fær London Mining í øllum førum brúk fyri 3500 fólkum, tá námið skal byggjast. Eftir hetta kemur námið at hava umleið 750 varandi størv. Mynd - Tekning av jarnnáminum, sum ætlandi kemur at liggja uttanfyri grønlendska høvuðsstaðin